*»…På dansk må det nok være Statsminister-pokalen, så det er eg meget fin turnering vi har med at gøre«*

*Ingi Højgaard, sakførari, tá hann fyri danska dómaranum legði fram ákæruritið hjá HB*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# ÍTRÓTTUR

HB-KÍ 3-1 (2-0):

## Uppiborið HB-steyp




*HB-unglingarnir, sum vunnu steypakappingina mikukvøldið. Aftara rað John Eystberg, venjari, Jákup Slættalíð, Rói Mohr Danielsen, Tróndur Sigurðsson, Niclas Eysturoy, Poul Thomas Dam, Ingvard Vang, Poul Kjartan Dam, Mikkjal Hvannastein og Jan C. Dam, venjari. Húkandi eru Pætur Jørgensen, Atli Mikkelsen, Jóhan Petur Holm, Tróndur Kragesteen, Birgir Poulsen, Ólavur í Ólavstovu og Yohan Borðoy*

**Eftir steðgin gjørdist dysturin nakað nógv meira spennandi, enn flestu HB'arar mundu bríggja seg um. Ikki minst, tí munurin fyri steðgin var heilt sjónligur**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Steypafinalan í unglingadeildini stóð á skránni mikukvøldið. Tað var ikki frítt, at spenningurin var stórur millum viðhaldsfólkini hjá bæði HB og KÍ, men luftin tóktist fara úr hesum mest sum alt fyri eitt.

### Stórur munur

HB var nevnliga greitt omaná frá byrjan. Tað var rár hending, at KÍ yvir høvur vitjaði á mótstøðuhálvuni, og tað gingu bara átta minuttir, áðrenn Pætur Jørgensen hevði skotið havnarmenninar framum, tá hann fangaði returbólt eftir gjøgnumbrot frá Ólavi í Ólavsstovu.

Og átta minuttir seinni var aftur galið. KÍ hevði annars júst havt meira enn 100% møguleika, eftir at HB-málverjin fór skeivur av høgum bólti, men onkursvegna fór skotið við síðuna av málinum, eftir at KÍ'arar tríggjar høvdu spælt millum sín í brotsteiginum. Og so revsaði HB í hinum endanum. Hornasparksinnlegg varð sent í brotsteigin, og har kundi Jákup Slættalíð stýra bóltinum í netið.

Ogrestina av hálvleikinum stýrdu havnarmenninir fult og heilt. Bæði sum lið og spælara fyri spælara tóktist liðið hjá HB at innihalda nakað væl meira av kvaliteti. Royndirnar á málið vóru eisini fleiri, og hóast KÍ hevði onkran vandamiklan kontrabólt, so tóktist tað bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn dysturin fullkomuliga varð punkteraður.

### Óvæntaður spenningur

Eftir steðgin broyttist gongdin nakað. HB tóktist taka tað meira róligt, og spakuliga arbeiddi KÍ seg meira inn í dystin. Berandi spælararnir á liðnum fingu eisini nógv betri tak á, og spakuliga spurdust møguleikar eisini burturúr.

Og tá teir so 20 minuttir fyri leiklok minkaðu eftir frísparksinnlegg til handara stólpa, og tá málverjin ikki helt innlegginum, kundi Álvur Christiansen stúta í kassan.

Og so var av álvara lagt upp til trýst seinastu løtuna. Teir reyðu og svørtu tóktust ikki heilt álvuligir, nú KÍ brádliga var um at fáa fatur á dystinum. Frustratiónir vóru eisini at síggja, tá dómarin nakrar ferðir mátti taka gula kortið fram eftir grov frísprøk, men útjavningin kom tó ikki. Ístaðin kundi Jóan D. Holm tríggjar minuttir fyri tíð drepa dystin. Á markinum til rangstøðu varð hann sendir inn um mótstøðuverjuna, og hóast KÍ royndi at fáa linjudómaran at veittra, so var Jóan ískaldur, tá hann smekkaði fram við málverjanum. 3-1 til HB, sum soleiðis aftur setti seg á steypakappingina í unglingadeildini.

### FAKTA UM DYSTIN

**HB-KÍ 3-1 (2-0)**

**1-0:** Pætur Jørgensen, 7.
**2-0:** Jákup Slættalíð, 17.
**2-1:** Álvur Christiansen, 71.
**3-1:** Jóan D. Holm
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**HB:** Birgir Poulsen – Ingvard Dam, Niclas Eysturoy, Jákup Slættalíð, Johan Borðoy – Ólavur S. í Ólavsstovu, Mikkjal Hvannastein, Poul Thomas Dam – Pætur Jørgensen, Tróndur Sigurðsson, Poul Kjartan Dam
Skiftispælarar: Atli Mikkelsen, Rói Danielsen, Jóan D. Holm, Dánjal Davidsen, Tróndur Kragesteen
**Gul kort:** Rói Danielsen, Ingvard Dam, Johan Borðoy
KÍ: Mathias Samuelsen – Rudolf Eliasen, Steffan Kalsø, Ari Samson –- Álvur Christiansen, John Hammer, Kristian Andreasen, Eli Simonsen, Kristoffur Jacobsenn, Sigmund Jacobsen – Páll Klettskarð
**Skiftispælarar:** Sylvan Jacobsen, Høgni Eliasen, Bjarki Vágstún, Henry Heinesen, Niels Pauli Danielsen
**Gult kort:** Kristian Andreasen, Eli Simonsen, John Hammer, Kristoffur Jacobsen, Sigmund Jacobsen

## Kendu okkum ikki tryggar

Ein av mest týðandi spælarunum á vinnandi HB-liðnum mikukvøldið var Ólavur S. í Ólavsstovu, sum eisini var liðskipari.

Hóast HB gjøgnumgangandi var betra liðið í finaluni, so ásannaði Ólavur, at tað eina løtu í seinna hálvleiki stóð heilt nógv á.

– Vit leggja okkum kanska ótilvitað dekan ov langt aftur á vøllin, og so koma vit undir trýst.

Var tað kanska eisini, tí tit kendu tykkum vísar í sigrinum eftir fyrra hálvleik?

– Avgjørt ikki. Vit vistu, at KÍ vildi gera alt, sum stóð í teirra makt, fyri at vinna dystin. So um vit bakkaðu, so var tað heilt víst, at teir fóru at trýsta seg frameftir. Tá teir so eisini skora til 1-2, verða vit rættiliga nervøsir, og tí var triða málið ein øgiligur lætti at fáa, staðfesti Ólavur.

Hetta var annars næsti harði dysturin upp á bara fimm dagar hjá Ólavi. Leygardagin spældi hann 90 minuttir, tá HB tapti tepur fyri FC Dinaburg, og sunnudagin er grannauppgerð í Formula-deildini móti B36 á skránni. Men hóast hann kanska tóktist dekan tungur móti dystarenda mikukvøldið, so helt hann ikki, at hetta fór at nerva til sunnudagin.

– Ein dyst móti B36 er mann altíð klárur til. Talan er um grannauppgerð, og tað ger altíð, at tú ert eyka uppsettur, ljóðaði svarið, áðrenn hann aftur fór yvir til liðfelagarnar.

**-mørk**

